*Myndin ovast t.v.: Nógv tíðindafólk vildu fáa orðið á Madonnu. Niðara myndin t.v.: Jeffrey Fulvimari, teknari, og Niels Jákup Thomsen, leiðari á Bókadeild Føroya Lærarafelags T.h.Madonnna*







# Tann fegni teknarin

Tað er ein avbjóðing at tekna barnabøkur, sigur teknarin Jeffrey Fulvimari, sum hevur teknað Ensku rósurnar. Hann er annars best kendur sum reklamuteknari

BÓKAÚTGÁVA
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Líka til tað allarsíðsta var tað hildið loyniligt, hvør hevði myndprýtt bókina Ensku rósurnar hjá Madonnu. Helst fyri at vekja áhuga og forvitni hjá fólki.

Jeffrey Fulvimari hevur myndprýtt fyrstu bókina; allar hinar verða prýddar av øðrum grafikarum, so tær fáa allar hvør sítt skap. Nú úrslitið liggur á borðinum sæst, at myndprýðingin telur nógv í samlaða úrslitinum. Stílurin í fyrstu bókini er eitt sindur Bratzkendur, soleiðis at skilja, at høvdini á gentunum eru ov stór í mun til kroppin, eins og hjá væl umtóktu dukkunum, og tær eru vakrar. Nógvar krussidullur og smálutir seta sín heilt serliga dám á bókina.

Jeffrey Fulvimari er kendur grafikari og hansara verk hava verið víst í eitt nú Vogue, Elle, Glamour, Newsweek og aðrastaðni. Hann hevur verið knýttur at móta, sjónvarps- og blaðlýsingum. Jeffrey Fulvimari sigur, at samstarvið millum seg og Madonnu hevur gingið væl við hesari barnabókini.

– Vit arbeiddu fyrst og fremst gjøgnum internetið. Madonna visti akkurát, hvat hon vildi hava, og tað gjørdi meg als ikki bilsnan. Hon varð ógvuliga greið og tískil ein góður »art director«. Alt byrjaði við grovum sketsjum, og tær fimm rósurnar komu beint úr mínum penni. Síðan hava vit sent myndir aftur og fram, til úrslitið var nøktandi fyri øll, sigur Jim Fulvimari.

Nú bókin liggur á borðinum, er hann glaður um úrslitið. Hetta er fyrstu ferð, hann hevur teknað eina barnabók. Og hann hevur verið glaður fyri avbjóðingina.

– Við »Ensku rósunum« kundi eg úttrykkja meg, vera lættur í sinni, og mær var loyvt at hava tað stuttligt á ein hátt, sum eg ikki sleppi, tá eg tekni til vaksin. Eg kom veruliga at kenna hesar gentunar í bókini. At tekna er sum at spæla sjónleik. Tú gevur fólkunum lív, tú letur tey í, og tú hugsar um, hvussu tey munnu bera seg at, um tú gerst okkurt. Ensku rósurnar eru tær fyrstu, sum eg havi skapt fullkomiliga sjálvur. Tær kennast næstan sum míni egnu børn, og eg føli næstan, at eg skal verja tær, sigur Jim Fulvimari.

## Søgan um Madonnu

Madonna Louise Veronica Ciccone Ritchie var fødd í Bay City í Michigan og er eitt av átta børnum í einari stórari italskari familju. Henni dámdi tíðliga tónleik og at dansa, og hon vann sær pláss á University of Michigan.

Stutt eftir kom hon til New York í eini roynd at fáa sær karrieru sum dansari. Hennara alskur til tónleik førdi hana í fleiri bólkar, teirra millum Breakfast Club. Hon fekk sáttmála við Sire Records í 1982 og fóru undir at skriva, syngja og útgeva tónleik. Tað hevur hon arbeitt við í tjúgu ár og er ein tann mest viðurkenda og dámda í nýggjari tíð.

Seinastu 20 árini hevur Madonna selt útvið 200 milliónir fløgur og plátur um allan heim og hevur havt yvir 25 løg millum tíggju tær bestu singlurnar á hittlistunum. Teirra millum eru Like a Virgin, Material Girl, Like A Prayer, Express Yourself, Vogue, Ray of Light og Music millum tær kendastu, og hon hevur móttikið tríggjar Grammy Awards. Seinasta fløgan »American Life« kom út í apríl 2003 og hevur fingið góða móttøku.

Hon hevur eisini gjørt vart við seg í filmi. Millum teirra eru Desperatly Seeking Susan, Dick Tracy, A league of Their Own og Truth or Dare. Hennara leiklutur í filminum Evita eftir kenda sangleikin hjá Andrew Lloyd Webber og Time Rice er hæddarpunktið, og vann hon Golden Globe Awards fyri hann.

Nú hevur hon so skrivað fimm barnabøkur. Tann fyrsta The English Rose kom út á 30 málum, teirra millum føroyskum, í meira enn 100 londum samstundis tann 15. september. Næsta bókin kemur 10. oktober.

Madonna er gift filmsstjóranum Guy Ritcie og hevur tvey børn, Lolu og Rocco. Tey búgva bæði USA og Onglandi.

# Poppdrotningin og barnabókin

Madonna hevur ein greiðan moralskan boðskap í síni nýggju barnabók. Øvundsjúka er spill av tí, sigur Madonna, sum í sjey ár hevur granskað Kaballah, sum hon fær íblástur frá

BÓKAÚTGÁVA
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Týdningarmesti lærusetningurin, sum dagsins børn kunnu læra um lívið, er at øll eru knýtt hvør at øðrum onkursvegna. Tað segði Madonna, tá hon helt tíðindafund mánadagin.

– Vit mugu læra at elska og leggja í medmenniskju, óansæð hvat. Vit mugu læra, at okkara tankar, orð og gerðir hava ávirkan á onnur fólk kring okkum. At tað at broyta verðina byrjar við einum tanka, segði Madonna.

Við hesum orðunum vísti hon samstundis, at hon hevur ein greiðan boðskap við sínum fimm barnabókum, ið eru ávegis. Mánadagin kom tann fyrsta í røðini, sum nevnist Ensku rósurnar. Bókin varð løgd fram á tíðindafundi í París, og Sosialurin var á staðnum, av tí at hon eisini kom út á føroyskum sama dag.

Madonna minti staðiliga vælmannaðu tíðindafjøldina á, at tey vóru har fyri at tosa um hennara nýggju bók. Og ikki um alt hitt, sum hon er vorðin kend fyri. Tað eydnaðist bara partvíst, men hon fekk víst, at hon er gløgg og megnar at svara fyri seg.

– Tvær orsøkir eru til, at eg nú skrivi bøkur til børn. Eg havi sjálv tvey børn, og tey eru ein stór íblástrarkelda hjá mær. Harafturat haldi eg tað hava stóran týdning, at býta tað við onnur, sum tú hevur lært. Børn eru opin og sinnað at læra, so eg helt at eg skuldi byrja at býta tað við tey, sum eg havi lært, segði Madonna.

### Granskar Kaballah

Til allar fimm barnabøkurnar, sum Madonna hevur skrivað, hevur hon funnið íblásturin úr ortodoksu jødisku trúnni Kaballah, sum hon er farin at granska. Kaballah byggir á eina lívgevandi keldu, sum er Gud, og tað ræður um ikki at missa sambandið við hesa keldu. Fyrsta bókin snýr seg um øvundsjúkuna, sum er ein háttur at missa sambandið.

– Sum barn upplivdi eg sjálv øvund móti øðrum gentum av ymsum orsøkum: Eg var øvundsjúk, at tær høvdu mammur, ella tí tær vóru vakrari ella ríkari enn eg. Tað er ikki, fyrr enn tú gerst vaksin, at tú finnur útav, hvussu stórt spill av tíð slíkar kenslur eru, sigur Madonna, sum nú upplivir øvundina á egnum kroppi.

Hinar bøkurnar snúgva seg millum annað um megina í orðum, at læra ikki at døma onnur, óvissu og girnd.

Sagt hevur verið um Madonnu, at hon hevur bygt sína karrieru á at gera ymiskt óvæntað, uttan hugsa ov nógv um avleiðingarnar. Nú hon hevur børn, ber ikki til at hugsa soleiðis longur, heldur hon.

– Tá tú fært børn, setir tað eina røð av spurningum í gongd, og tú leitar eftir svarum. Eg fann nógv svar, tá eg fór at lesa Kaballah fyri sjey árum síðani. Eg fann útav, at har vóru nógv góð svar upp á allar mínar spurningar og mínar gerðir, góðar og ringar. Eg fann útav týdninginumav , at vit øll eru ein eind, sigur Madonna.

### Prinsurin betri enn Potter

Madonna hevur fingið stóra viðurkenning fyri síni mongu avrik. Fyri tónleik, video, film, konsertir og sjónleik. Og ikki minst sum handilskvinna. Nú er talan um heilt annan tátt. Barnabøkurnar eru heilt øðrvísi at arbeiða við, sigur hon, og hon følir eisini eina heilt aðra gleði enn áður, tí hon fær ongar pengar afturfyri.

– Allur peningurin fer til at hjálpa børnum. Av tí, at eg ikki vinning burturúr og framman undan visti, at hvørt oyra fóru til at hjálpa børnum, so var eg leysgivin og mín motivatión var hvørki peningalig ella egoistisk fyri fyrstu ferð í lívinum, sigur Madonna.

Sum ein onnur Astrid Lindgren hevur Madonna funnið stóra hjálp hjá dóttrini, tá hon hevur skrivað bókina.

– Hon segði mær, nær hon var keðilig. Hon bað meg fáa genturnar at gera okkurt ávíst, sum henni dámdi serliga væl, og hon hjálpti mær at finna teknarar, sigur Madonna.

Sjálv nevnir hon Alice in Wonderland og Winnie the Pooh, sum tvær av góðu bókunum, hon hevur lisið, men serliga Lítli prinsurin er góður. Betri enn Harry Potter hjá Rowlings, heldur hon.

# Løtt og hugvekjandi

UMMÆLI
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Persónurin Madonna vakti meira ans enn bókin, tá »Ensku rósurnar« vóru lagdar fram í París. Men uttan mun til, hvør hevur skrivað, so er talan um eina góða barnabók.

Hon snýr seg um tær fýra smágenturnar, Nicole, Amy, Charlotte og Grace, sum eru 11 ára gamlar og bestu vinkonur. Tær eru eitt sindur øvundsjúkar inn á Binu, sum eftir øllum at døma er perfekt. Vøkur, fitt og vældámd, og tað kundu tær hugsað sær eitt sindur av. Men tá ein álva kemur upp í leikin, vísir tað seg, at alt er ikki, sum tað sýnist.

Bókin snýr seg stutt og greitt um øvundsjúku, og tað er ikki heilt av leið, tá Madonna sigur, at hon eisini er fyri vaksin. Tí hon er lætt lisin og hevur ein greiðan boðskap: Ver ímóti øðrum, sum tú ynskir onnur skulu vera ímóti tær.

Talan er um eina modernaða útgávu av Øskufíu, og í so máta er hon ikki nýskapandi. Men hon reisir nakrar spurningar, fær børn at hugsa og gevur møguleika fyri, at børn og vaksin fáa tosað saman um nøkur ting, um tey lesa hana saman. Og tað er ikki so galið.

# Í audiens hjá Madonnu

Formaðurin í Bókadeild Føroya lærarafelags, Niels Jákup Thomsen, hevur gjørt nakað saman við Madonnu, sum eingin annar hevur roynt: Tosað føroyskt við poppdrotningina. Hann heldur tað hava stóran týdning at sleppa við til slík tiltøk

*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Tað hevur vakt ans, at eitt so lítið máløki sum tað føroyska megnar at vera við í fremstu røð í bókaútgávu. Journalistar og bókaforleggjarar, sum vóru í París í sambandi útgávuna av barnabókini hjá Madonnu, vóru ovfarnir av, at hetta lítla fólkið í Norðuratlantshavi hevur egið mál og gevur hundraðtals bøkur út hvørt ár.

At tað so eisini hevur eydnast at fáa eina bók eftir Madonnu út í Føroyum samstundis sum í øllum heiminum, hildu fleiri fólk vera undrunarvert.

Eftir at bókin »Ensku rósurnar« varð løgd fram á tíðindafundinum í París mánadagin, bjóðaði Gallaway forlagið til gardenparty saman við Madonnu, har sjampanja og pinnamatur var boðið. Men hóast hon onkuntíð bara stóð ein metur frá, so bar ikki til at koma beinleiðis í prát við Madonnu.

Hjá Niels Jákup Thomsen, leiðara í Bókadeild Føroya lærarafelags, sum stendur fyri føroysku útgávuni, bar kortini til. Hann slapp so at siga í audiens hjá poppdrotningini í sambandi við, at bókaútgevarar ein og ein vórðu avmyndaðir saman við Madonnu. Hann sigur, at áðrenn hesa bókaútgávuna, hevur hann ikki hugsað nógv um Madonnu, men tað var hugtakandi at uppliva, hvussu stórur áhugin var fyri hennara persóni. Alt snúði seg um hana.

– Áðrenn hon kom, varð nógv prátað, men so gjørdist kvirt: Hon kom, umgird av vaktarmonnum við oyrasniglum og fartelefon, og øll eygu vóru vend ímóti henni. Tað kendist nakað sum at vera statistur, eisini ta stokkutu stund, eg fekk høvi at heilsa upp á hana. Hon spurdi, hvussu føroyskt mál var, og eg royndi sum frægast at greiða frá.

– So bað hon meg siga okkurt á føroyskum; tað gjørdi eg, og síðan var liðugt at taka mynd av okkum og næsti skuldi framat. Hon hevur útrúliga útstráling, og eg havi varhugan av, at hon er gløgg og sera tilvitað um, hvat hon ger, sigur Niels Jákup Thomsen.

Hann vil ikki avdúka, hvat hann segði á føroyskum. Tað verður teirra millum. Men hvat skulu føroyskir bókaforleggjarar í París? Er tað neyðugt?

– Eg haldi, at tað er týdningarmikið at vera til staðar, tá ið tílíkt hendir, fyri at vísa, at vit eru ein álítandi samstarvsfelagi. Tú fært høvi at hitta fremstu forleggjararnar í heiminum, og slík sambond eru týdningarmikil. Tá ið okkurt annað er, har vit kundu hugsað okkum at sloppið upp í part, gerst alt nógv lættari, um tú í fyrsta lagi longu hevur fingið beinleiðis sambandi við tey, íð standa fyri útgávuni. Tað hevur eisini týdning, at vit kunnu vísa á, at vit tóku lut í heimsumfatandi útgávunum at Madonnu-bókunum, sigur Niels Jákup Thomsen.

Tað ger tað ikki verri, at tíðindafólk fáa hug at gera viðmerkingar til okkara støðu sum eitt hitt minsta máløki í heiminum, sum kortini sleppur upp í part, heldur hann.